# Smáttfallandi hýsa til portiónir

**– Tað hevur gingið hampiliga væl at fingið fatur á hýsu til framleiðsluna av portiónum, men fiskurin er yvirhøvur smáttfallandi, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari í Miðvági**



*Á Fiskavirking í Miðvági verður hýsa virkað til portiónir, sum seldar verða til Onglands og Fraklands. Lítið og einki fer til USA*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er serliga hýsa, sum í stórum nøgdum er farin óvirkað av landinum seinastu árini. Torført hevur verið at kappast við enska marknaðin, men kortini eru tað nøkur virki í Føroyum, sum virka hýsu til eitt nú portiónir.

Eitt av virkjunum, sum meira at kalla burtur av virkar hýsu til portiónir, er virkið hjá Fiskavirking í Miðvági.

Av virkjunum hjá Føroya Fiskavirking, telist virkið á Tvøroyri eisini millum tey, sum gera nakað burtur úr hýsuni, men har arbeiða tey eisini onnur fiskasløg.

### Støðugt arbeiði

Jason Johannesen, virkisleiðari í Miðvági, sigur, at arbeiðið á virkinum hevur verið rættiliga støðugt í longri tíð.

– Vit hava sum heild fingið nóg mikið av hýsu til framleiðsluna, sum serliga verður seld til Onglands og Fraklands. Lítið og einki fer til USA.

Hann sigur, at tá ið minni hevur verið at fingið av hýsu, og nógvur upsi annars hevur verið á marknaðinum, hava tey arbeitt nakað av upsa.

– Men tað er langt ímillum, at vit gera tað, sigur hann.

Á virkinum hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági arbeiða eini 70 fólk.

– Vit keypa meginpartin av rávøruni á uppboðssølu, men ein partur verður keyptur beinleiðis frá skipunum.

Jason sigur, at uppi í veiðini hjá línuskipunum eru ofta onnur fiskasløg eisini, og tí er tað mangan lættari at keypa fiskin á uppboðssølu – ella frá øðrum virkjum, sum ikki arbeiða hýsu.

### Smáttfallandi

Virkisleiðarin sigur, at hýsan sum heild er smáttfallandi.

– Tað er eingin stór hýsa at fáa. Meginparturin av tí, vit arbeiða, liggur um 890-900 gramm, og tá er hetta tað, ið rópt verður hýsa 3, sum annars liggur millum 500 og 1000 gramm.

Jason sigur, at rættiliga lítið er av hýsu 2, sum liggur millum 1 og 2 kilo og uppaftur minni av hýsu 1, sum er uppaftur størri.

– Liggur hýsan ein arbeiðsdag um 1 kilo, siga vit, at hon er góð, leggur hann aftrat.

Hann sigur, at hóast fiskurin er smáur, er hann rímiliga góður.

– Eg haldi, at hýsan er, sum hon plagar at verða til fiti hesa tíðina av árinum, sigur Jason.

### Vánaligt veður

Hvussu komandi dagarnir fara at roynast, sigur Jason seg illa at duga at meta um.

– Veðrið er rættiliga óstøðugt, bæði her hjá okkum og í Norðsjónum. Tí kann hugsast, at útlendski marknaðurin verður góður undan jólahøgtíðini.

Tey vóru annars liðug við fiskin, sum virkið hevði inni, á middegi í gjár.

Síðan var turt gólv.

– Men tað kann verða so skjótt, at vit fáa fisk aftur – og okkurt er á marknaðinum í dag, sigur Jason Johannesen at enda.




*– Hýsan er smáttfallandi, men hon er rímiliga góð til fiti, sigur virkisleiðarin, Jason Johannesen*

# Nógvur fiskur upp á land í Sandoynni

**Seinastu tíðina hevur nógv fiskaarbeiði verið á virkjunum hjá Sandoy Seafood í Skopun og á Sandi**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Upsin er eisini álitið hjá Sandoy Seafood. Fleiri landingar hava verið seinastu vikuna, og haraftrat hevur felagið keypt fisk frá eitt nú P/F Beta í Saltangará*

Trolararnir fáa framvegis nógvan upsa, meðan minni kemur burtur úr hjá teimum, sum reka útróður.

Seinastu dagarnar er nógvur fiskur komin upp á land í Sandoynni.

Seinasta fríggjadag landaðu partrolararnir, Nornagestur og Kolumbus, góð 200.000 pund á Sandi, og longu í dag koma skipini inn aftur at landa.

Tá ið vit frættu av Sandoy Seafood í gjár, var ikki greitt, hvussu nógv teir hava inni hendan túrin.

Í gjár landaði Eysturbúgvin á Sandi. Teir høvdu eini 220.000 pund, so skipið var næstan fult undir lúkurnar.

Meginparturin av veiðini hjá trolarunum er upsi.

Aftrat skipunum, sum hava lagt veiðina upp á Sandi seinastu vikuna, hevur Sandoy Seafood eisini keypt væl av upsa frá eitt nú P/F Beta í Saltangará.

Á virkjunum hjá Sandoy Seafood arbeiða tilsamans stívliga 100 fólk. Eini 60 í Skopun og eini 40 á Sandi við landarunum.

Tann nógvi upsin verður skorin til flak í Skopun, men nakað verður eisini saltað á Sandi.

### Lítil útróður

Á Sandi siga tey, at lítil útróður hevur verið higartil í heyst. Tað hevur viðrað illa, og lítil fiskur hevur verið at fingið.

Sagt verður, at onkur bátur er við línu, tá ið viðrar, men veiðan fer sjáldan yvir 100 pund á stampin.

Agnið er dýrt, og tí er útróðurin, sum eisini av veðri er lítið støðugur í løtuni, ikki serliga lønandi við tí veiði sum er.

Á Sandi siga tey, at slagið, sum bátarnir fáa, er ein blandingur av hýsu og toski.